Umboðsmaðurin:

# Annlis er óvanlig men ikki ólóglig

**Umboðsmaðurin gevur Mentamálaráðnum tvær smáar átalur, men leggur einki í um Annlis Bjarkhamar tók málið um seta av landsantikvari í egnar hendur**

LANDSANTIKVARUR
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*



*Annlis Bjarkhamar var óvanlig í síni málsviðgerð, men hon breyt ikki fyrisitingarlóg ella almennu leiðreglurnar fyri setanarpolitikk*

Annlis Bjarkhamar kundi gott halda sínar egnu samrøður við teir báðar, sum stóðu at fáa starvið sum landsantikvarur. Men tað er óvanlig mannagongd. Tað er eisini óvanligt ikki at fylgja eini samdari setanarnevnd.

Men tað er hvørki ólógligt ella verður átalað av umboðsmanninum.

Politiskt var tað so forkastiligt, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, koyrdi hana frá. Tað gjørdi hann, tí hon valdi at seta Steffen Stumann Hansen í starv nakrar fáar dagar eftir, at løgmaður hevði biðið hana bíða.

Men tað sigur umboðsmaðurin einki um. Umboðsmaðurin sigur einki um tað var rætt at koyra Annlis Bjarkhamar frá, men sigur at hon breyt ikki almenna setanarpolitikkin.

Hin umsøkjarin, Símun Arge, helt seg ikki hava fingið rætta viðgerð, tá starvið var sett, tí hann var einmælt innstillaður. Fakfelagið hjá honum, Magistarafelagið, kærdi til umboðsmannin, um alt var gingið rætt fyri seg.

Og felagið fær heldur ikki viðhald í síni kæru.

Ein av stóru spurningunum var um tað var í stríð við almenna setanarpolitikkin, at Annlis Bjarkhamar sjálv fór inn í málsviðgerðina og skúgvaði innstillingarnar frá setanarnevndini til viks.

Ein annar spurningur var, um hon hevði neyðuga fakliga førleikan at meta um, hvør av teimum báðum var best skikkaður.

Ein triðji spurningur var, um báðir umsøkjararnir høvdu havt eins góðar møguleikar til samrøðurnar, tí ein hevði lisið føroysku starvslýsingina og hin donsku, og tær vóru ikki eins.

### Óskiljandi notat

Umboðsmaðurin gevur bara tvær smáar átalur. Og tær hava einki við Annlis Bjarkhamar at gera. Tær eru vendar móti Mentamálaráðnum, sum Annlis Bjarkhamar tó hevði fyrisitingarligu ábyrgdina av.

Umboðsmaðurin gevur átalu fyri, at setanarnevndin einki notat skrivaði frá samrøðum, sum nevndin hevði við aðrar persónar um umsøkjararnar.

Setanarnevndin ringdi til fleiri persónar og spurdi teir um teirra meting av báðum innstillaðu umsøkjarunujm. Telefonsamrøðurnar vóru tiknar upp á band, men vóru ikki niðurskrivaðar.

Her vísir umboðsmaðurin til, at samrøður við aðrar persónar, sum skulu siga sína hugsan um ein umsøkjara, hava týdning fyri málsviðgerðina og tí hava embætisfólkini skyldu at skriva notat um innihaldið í samrøðunum.

Hetta var ikki gjørt. Í staðin lógu sjey A-4 ørk í málinum. Men tey skilti umboðsmaðurin ikki nakað av og tí kundu tey ikki brúkast til nakað.

Í eini av hesum samrøðum segði tann uppringdi, at hann ikki gav Steffen Stumann Hansen bestu skoðsmál. Soleiðis verður sagt í innstillingini, men tað var ikki sagt nærri, hvat meint var við.

Her gevur umboðsmaðurin Mentamálaráðnum eina átalu, tí tá nakað negativt kemur fram um ein persón, og tað kann ávirka málsviðgerðina, so skulu slíkar upplýsingar leggjast fyri persónin, áðrenn avgerð verður tikin.

Í hesum førinum skuldi Steffen Stumann Hansen verður spurdur um, hvat hann hevði at siga til, at ein ikki gav honum bestu skoðsmál. Sjálvandi serliga, tí hann ikki var innstillaður.

### Annlis blandaði seg uppí

Setanarnevndin viðgjørdi umsóknirnar frá teimum báðum og hevði setanarsamrøður. Niðurstøðan hjá setanarnevndini var einmælt: Vit innstilla Símun Arge til starvið.

Annlis Bjarhamar var ikki nøgd, hon vildi hava betri grundgevingar og bað setanarnevnina fara gjøgnum tilfarið einaferð afturat. Tað gjørdi nevndin og segði seg nú verða komna til eina enn greiðari niðurstøðu: Vit innstilla Símun Arge til starvið.

So tók Annlis Bjarkhamar málið í egnar hendur og hevði sínar egnu setanarsamrøður við báðar umsøkjararnar.

Eftir hesar samrøður helt landsstýriskvinnan, at Steffen Stuman Hansen var tann betri maðurin og hann var settur.

Umboðsmaðurin er sera varin í sínum niðurstøðum um hesi viðurskifti. Hann staðfestir, at ein landsstýrismaður hevur myndugleika at seta starvsfólk og ein landsstýrismaður hevur rætt til at útvega sær upplýsingar. Niðurstøðan er, at hann finnur ongar reglur, sum forða landsstýriskvinnuni at halda setanarsamrøður, men umboðsmaðurin heldur tað vera óvanligt.

Hann heldur, at tað hevði verið rættast at biðið setanarnevndina um enn meiri dokumentasjón, um landsstýriskvinnan hevði brúk fyri meiri upplýsingum, heldur enn sjálv at fara til verka.

Umboðsmaðurin hevur kannað 25 starvssetanir innan tað almenna og í ongum øðrum føri hevði landsstýrismaðurin hildið egnar samrøður við umsøkjarar. Og bert í einum føri hevði landsstýrismaðurin ikki fylgt innstilling frá setanarnevnd. Og í tí førinum var innstillingtin ikki einmælt.

### Var førleikin í lagi

Fakfelagið hjá Símuni Arge reisti spurningin fyri umboðsmanninum, um landsstýriskvinnan hevði fakligan førleika at taka eina avgerð av hesum slagi. Og her krýpur umboðsmaðurin uttanum.

– Eg havi ikki kannað henda spurning, eins lítið og eg havi kannað førleikan hjá setanarnevndini til at meta um hetta. Eg loyvi mær at ivast í, um landsstýriskvinnan hevur serligan førleika í so máta, skrivar umboðsmaðurin í síni niðurstøðu og leggur afturat:

– Hetta er tó ikki øðrvísi enn í nógvum øðrum málum, har ein landsstýrismaður tekur avgerð, skrivar umboðsmaðurin.

Sostatt er niðurstøðan, at ein landsstýrismaður sjálvur avger, nær hann heldur seg hava nóg mikið av upplýsingum ella haldgott grundarlag, sum umboðsmaðurin nevnir tað.

### Tvær lýsingar

Umboðsmaðurin hevur lisið føroysku og donsku lýsingina eftir landsantikvari og sigur púra greitt, at har var talan um tvær ymiskar lýsingar. Og talan var yvirhøvur ikki um nakra umsetingarvillu.

Í donsku lýsingini verður nevnt, at Fornminnissavnið skal arbeiða við gransking bæði í Føroyum og uttanlands.

Umboðsmaðurin heldur, at munurin á teimum báðum lýsingunum tykist at hava rættuliga avgerandi týdning, tá landsstýrismaðurin avgjørdi, hvør skuldi hava starvið.

Fyri tað fyrsta átti Mentamálaráðið beinanvegin at lýst av nýggjum bæði í Føroyum og í Danmark, tí tað hevði verið tíð til tað.

Men í øðrum lagi heldur umboðsmaðurin kortini, at tá Símun Arge var tann, sum hevði lisið føroysku lýsingina og hann hevði verið deildarleiðari og leiðari á Fornminnissavninum í so nógv ár, so átti hann at havt minst líka góðar fortreytir fyri at komið væl frá eini setanarsamrøðu, sum Steffen Stumann Hansen.

Magistarafelagið:

# Setanin var politisk

**Eyðun Andreassen úr Magistarafelagnum heldur, at niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum eru veikar**

LANDSANTIKVARUR
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Annlis Bjarkhamar hevði ikki fakligan førleika at meta um, hvør umsøkjari til starvið sum landsantikvarur, var best skikkaður. Tí var Steffen Stumann Hansen politiskt settur.

So hvøss er niðurstøðan hjá Eyðuni Andreassen, nevndarlimi í Magistarafelagnum. Hann vísir á, at í starvslýsingini var kravt at umsøkjararnir skuldu metast av eini fakligari setanarnevnd.

– Annlis var læraraskúlanæmingur tá, og kann tí ikki hava bygt sína avgerð á fakligan førleika. Altso má hon hava bygt upp á okkurt annað. Og tað kann bara vera ein politisk avgerð, tí hon var politikkari, sigur Eyðun Andreassen.

Magistarafelagið, sum hevði kært til umboðsmannin, fekk ikki viðhald í nøkrum av sínum kærupunktum.

### Fleiri starvslýsingar

Eyðun Andreassen fýlist eisini á, at umboðsmaðurin ikki viðger brævið frá Annlis Bjarkhamar til Símun Arge, har hann fær at vita, at hann ikki fær starvið.

– Tá Símun fær avslagið nevnir hon nýggjar treytir fyri starvssetanini, sum eingin áður hevði sæð, sigur Eyðun Andreassen og undrast yvir at umboðsmaðurin ikki viðger tað.

Eyðun Andreassen skuldsetur Annlis Bjarkhamar fyri eitt av tveimum. Antin hevur hon havt tær treytirnar í huganum alla tíðina, men ikki sagt tað hart. Ella hevur Annlis Bjarkhamar funnið upp á nýggju treytirnar aftaná fyri at sleppa at seta Steffen Stumann Hansen í starv.

Eyðun Andreassen leggur tó dent á, at felagið ikki hevur nakra meining, um hvør av teimum báðum skuldi verið settur í starv. Felagið kærdi bara mannagongdirnar.



# Annlis Bjarkhamar provokeraði løgmann

**– Løgtingsis Umboðsmaður hevur ikki reinsað Annlis Bjarkhamar. Tvørturímóti gevur hann henni nógv nefs og eg havi á ongan hátt broytt støðu, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður**

ANNLIS-MÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*–Annlis Bjarkhamar tók avgerð, hóast hon visti, at eg ætlaði at kanna málið. Sostatt sendi hon løgmanni tað signal, at tað kundi gera tað saman, hvat Løgmaður segði og gjørdi og tað var ov stór provokatión, sigur Annfinn Kallsberg*

– At siga, at Annlis Bjarkhamar er reinsað, er heilt burturvið.

Annfinn Kallsberg, løgmaður er als ikki samdur í, at Løgtingsmaður hevur reinsað Annlis Bjarkhamar.

– Tvørturímóti gevur hann henni nógv nefs fyri mátan, sum hon hevur handfarið málið um landsfornfrøðingin, sigur Løgmaður.

– Løgtingsis umboðsmaður vísir á, at starvið skuldi verðið lýst leyst av nýggjum, tí tað er so lítið samsvar ímillum tekstin í føroysku og donska starvslýsingini.

– Umboðsmaðurin vísir eisini á, at hevði hon ikki álit á setanarnevndini, skuldi hon havt valt eina nýggja setanarnevnd, sum hon hevði álit á.

Og tað skerst ikki burtur, at Annlis Bjarkhamar hevur ikki hildið setanarpolitikkin hjá tí almenna

– Umboðsmaðurin hevur kannað eina ørgrynnu av málum, men tað er ongantíð fyrr hent, at landsstýrismaður er gingin ímóti einari samdari setanarnevnd.

Umboðsmaðurin ivast eisini í fakliga førleikanum hjá Annlis Bjarkhamar- og setanarnevndini- at meta um umsøkjarnar.

– Men eftir øllum at døma, heldur Annlis kortini, at hennara fakligi førleiki er betri enn hjá nevndini, sigur Løgmaður.

– Tað er rætt, at Løgtingsins umboðsmaður sigur, at hon hevur ikki gjørt nakað ólógligt.

Men tað, sum hon hevur gjørt. er óvanligt og skulu vit byggja upp eina siðvenju, sum øll kunnu hava álit á, er tað neyðugt, at ávísar mannagongdir og siðvenjur verða fylgdar, hóast tað ikki beinleiðis er ásett í lóg.

– Hesar siðvenjur, hevur Annlis Bjarkhamar skúgvað til viks.

Løgmaður sigur, at løgfrøðiliga hevur hon onki skeivt gjørt, men við hesari framferðini, hevur hon máað politiska álitið undan sær sjálvum, sigur Løgmaður.

### Góðar orsøkir

Løgmaður heldur tískil eisini fast um, at hann hevði góðar orsøkir til at siga Annlis Bjarkhamar úr starvið.

– Hóast tjóðveldisflokkurin hevur roynt at gera hetta til eitt fyrisitingarligt mál, er tað ikki so. Uppsøgnin var politisk, tí eg hevði mist álitið á henni.

Annfinn Kallsberg sigur, at Annlis Bjarkhamar provokeraði so nógv við síni framferð, at hann hevði onki val.

– Annlis Bjarkhamar setti landsfornfrøðingin, hóast løgmaður var komin upp í málið og hevði biðið um eina viðmerking.

– Sostatt staðfestir Annlis Bjarkhamar sína avgerð og gevur Løgmanni ta signal, at málið er endaliga avgreitt, og so kann tað gera akkurát tað sama, hvat Løgmaður biðjur um.

Hetta tók Løgmaður sum eina so stóra provokatión, at hann segði hana upp.

– Slík framferð er ikki álitisvekjandi og gjørdi sítt til, at eg misti álitið á henni. Er hetta ikki at leggja teg út í sjálva málsviðgerðina?

– Nei, tað er tað ikki. Løgmaður hevur eftirlitið við landsstýsisfólkunum, men hvussu kann løgmaður hava eftirlit, um hann ikki kann leggja uppí eitt mál. Hetta var eitt mál, sum var ógvuliga nógv frammi, so sjálvsagt skal løgmaður leggja uppí eitt mál sum hatta, sigur Annfinn Kallsberg.

At Annlis Kallsberg nú hevur biðið Umboðsmannin kannað Løgmálaráðið, hevur hann ongr viðmerkingar til.

# Umboðsmaðurin skal kanna Anfinn Kallsberg

**Annlis Bjarkhamar vil nú hava løgtingsins Umboðsmann at kanna Løgmann, tí hon vil hava at vita um hann bar seg rætt at í málinum um landsfornfrøðingin**

ANNLIS-MÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ikki vist, at seinasta orðið er sagt í málinum um landsfornfrøðingin.

Tað málið endaði við, at Løgmaður kom uppí málið og at enda koyrdi hann.

Annlis Bjarkhamar úr starvinum sum landsstýriskvinnu í mentamálum.

Eftir at magistarafelagið legði málið fyri Løgtingsins Umboðsmann, er umboðsmaðurin komin til ta niðurstøðu, at Annlis Bjarkhamar breyt ikki setanarpolitikkin hjá landinum, tó ávís mistøk vórðu gjørd í Mentamálaráðnum.

Men samstundis ger umboðsmaðurin greitt, at hann hevur bara viðgjørt málið um, sjálva starvssetanina og tey viðurskifti, sum hava við at gera, eitt nú almenna setanarpolitikkin.

Sostatt hevur umboðsmaðurin ikki viðgjørt leiklut løgmans, sum hevur eftirlitið við landsstýrisfólkunum.

Hetta er Annlis Bjarkhamar ikki nøgd við.

Tí hevur hon nú heitt á Løgtingsins umboðsmann um eisini at kanna leiklutin hjá løgmanni í hesum máli.

– Eg sakni, at umboðsmaðurin tekur støðu til eftirspælið, tá ið Løgmaður og Løgmansskrivstovan fara inn í málið, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon metir, at Løgmaður og Løgmansskrivstovan gjørdi stór mistøk, sum Umboðsmaðurin ikki vil taka støðu til í hesum umfari.

Tí hevur Annlis Bjarkhamar nú heitt á Umboðsmanninum áheitan um at kanna eisini henda partin av málinum, tí hon metir, at hetta hevur stóran týdning fyri eftirtíðina.

### Ógvuliga fegin

Annars er Annlis Bjarkhamar ógvuliga fegin um, at Løgtingsins umboðsmaður er komin til tað niðurstøðu, at hon sjálv ikki hevur gjørt nakað ólógligt.

– Eg havi ikki brotið nakra lóg, hvørki lógina um ábyrgd landsstýrismanna ella fyrisitingarlógina.

Løgtingsins Umboðsmaður er komin framá nøkur viðurskifti, sum áttu at verið gjørd øðrvísi, men, tað, sum eg gjørdi, vóru ikki ólóglig.

Men Løgtingsins Umboðsmaður sigur eisini, at hóast Annlis Bjarkhamar ikki hevur gjørt nakað ólógligt, so er hennara framferðarháttur óvanligur. Tað, hann sipar til, er, at landsstýriskvinnan sjálv hevði setanarsamrøður við teir báðar, sum vórðu innstillaðir til starvið sum landsfornfrøðingur.

– Avgerðin hjá Løgtingsins Umboðsmanni vísir eisini, at hóast ein landsstýrismaður ikki fylgir eini setanarnevnd, kann talan hava verið um eina sakliga avgerð.

Annars hevur Løgtingsins umboðsmaður eisini nakrar atfinningar ímóti Mentamálaráðnum og tær hevur tú væl ábyrgdina av, sum ovasti leiðari fyri mentamálaráðið?

– Tað er sjálvandi rætt, sigur Annlis Bjarkhamar, men tær atfinningar, umboðsmaðurin hevði, vóru júst orsøkirnar til, at eg fór uppí málið sjálv.

Eitt nú metti umboðsmaðurin, at starvið átti at verðið lýst leyst av nýggjum, tí tað er so stórur munur á føroysku og donsku lýsingini.

Annlis Bjarkhamar er ikki samd!

– Munurin á donsku og føroysku lýsingini hevur ongan týdning fyri sjálva málsviðgerðina og tí metti eg ikki, at tað var ein trupulleiki. Tað var heldur ikki á nakran hátt til fyrimuns fyri annan av umsøkjarunum.

Somuleiðis vísir umboðsmaðurin á, at onki notat er skrivað frá einari samrøðu, sum er í málinum og tað átalar hann.

– Hetta var júst ein orsøk til, at eg fór uppí máli, tí eg helt, at grundarlagið hjá setanarnevndini var ikki haldgott. Eg fór eisini upp í málið, tí ymisk persónlig viðurskifti um annan umsøkjarin vórðu drigin fram, sum eg vildi hava greiði á.



*– Tað er neyðugt,at Løgtingsins umboðsmaður eisini kannar løgmann so at vit fáa alt fram í ljósið, tí hetta er eitt mál, sum vit kunnu læra av, sigur Annlis Bjarkhamar*

### Mugu broyta mannagongdir

Annalis Bjarkhamar sigur, at hetta málið vísur, at tað er brúk fyri at broyta mannagongdir og at fáa greiðari mannagongdir.

Tað vónar hon, at úrslitið av hesum málinum verður. Hon vónar eisini, at Umboðsmaðurin tekur áheitan hennara upp um at viðgeða leiklutin hjá løgmanni, tí eisini tað kann vera við til at varpa ljós á ymisk viðurskifti, sum eiga at vera rættað.

– Tað, at eg verðið sett frá er ein politisk avgerð og tað hevur lítlan týdning. Tað, sum hevur týdning er at fáa greiðar mannagongdir. Eitt nú hevur tað týdning at fáa greiði á, um Løgmaður uttan víðari kann leggja seg út í eitt mál, sum er í viðgerð. Løgmaður hevur eftirlit, men hann kann ikki samstundis gera seg til ein part í sjálvari málsviðgerðini. Skal Løgmaður leggja seg út í ena beinleiðis málsviðgerð, er hetta at taka grundarlagið undan lógini um ábyrgd landsstýrismanna.

– Alt hetta haldi eg, hevur alstóran týdning fyri eftirtíðina og tí mugu vit hava tey lýst, so at umsitingin veit, havt hon hevur at halda seg til, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Forða fyri illguna um politiska starvssetan

Løgmaður hevur áður víst á at tað skal ikki kunna sáast minsti ivi um, at ein starvssetan er politisk.

Og tað heldur hann, at illgruni kann sáast um, tá ið landsstýrismaðurin sjálvur tekur lut í setanarsamrøðunum.

Løgtingsins Umboðsmaður heldur tað vera ivasamt, um tað vil vera í samsvar við lógina, um tað verður ásett í setanarpolitikkinum, at landsstýrismaðurin ikki kann luttaka í setanarsamrøðum.

Men hann heldur, at tað kundu verið góðar orsøkir til eina slíka reglu, t.d. fyri at forða fyri, at illgruni kann taka seg upp um, at politisk heldur enn saklig atlit hava verið avgerandi í setanarmálum.

Men umboðsmaðurin sigur, at tað er í øllum førum ein politisk avgerð, um ein slík avmarking eigur at verða gjørd ella ikki og hann fer tí ikki at gera nakað tilmæli hesum viðvíkjandi.

Annlis Bjarkhamar tekur hetta ikki sum eina óbeinleiðis illgruna frá umboðsmanninumum, at starvssetanin var politisk.

– Eg uppfataði ikki sínar samrøður sum setanarsamrøður. Eg hevði eina samrøðu við teir báðar innstillaður umsøkjararnar fyri at fáa greiði á nøkrum viðurskiftum, sum vóru ógreið, sigur hon.